## DAGSINS MEINING

# Einki svar

Eitt áhugafelag hevur sett løgmanni ein fyrispurning viðvíkjandi uppsøgnunum í Almannaráðnum. Felagið kennir seg ótrygt og vil hava løgmann at kanna viðurskiftini. Orsøkin til at felagið vendir sær til løgmann, má væl vera tann, at løgmaður hevur ovastu ábyrgd av landsins fyrisiting og harvið hevur hann eftirlit við, at landsstýrismenn sita fyri sínum ábyrgdarøkjum á fullgóðan hátt. Men hóast rúm tíð nú er liðin, síðan felagið vendi sær til løgmann, hevur løgmaður ikki svarað. Hetta er løgið og kann neyvan góðtakast. Tað er tí komið hartil, at spyrjast má, hvat hetta er fyri nakað. Hví fær felagið ikki svar?

Løgmaður hevur avreitt starvsfólkapolitikkin til fíggjarmálaráðharran. Fyri mong er hetta ein fullkomuliga óskiljandi avgerð. Men hetta er sjálvandi ein avgerð, sum løgmaður hevur fullan rætt at taka. Hinvegin kann so verða spurt, hvat løgmaður so hevur eftir. Bert løgmaður kennir svarið. Hetta, at løgmaður hevur avreitt starvsfólkapolitikkin til annan landsstýrismann at fyrisita, frítekur ikki løgmann fyri at geva viðkomandi felag svar. Henda avgerð kann væl ikki frítaka løgmann fyri at ansa eftir, at landsstýrismenn sita fyri sínum økjum á fullgóðan hátt. Løgmaður er tí, uttan mun til, um tað líkar honum ella ikki, noyddur at fara inn í málið við uppsagnunum í Almannaráðnum.

Tá 4 leiðarar siga seg úr starvi, er nakað galið. Almenningurin hevur krav uppá at vita, hvat ið er galið. Tann, ið fyrst og fremst skal tryggja, at almenningurin fær innlit í hetta mál, er løgmaður. Hann má tí gera sína skyldu. Ger hann ikki tað, so skaðar hetta virðing hansara millum manna. Eftir eru tá bert tveir møguleikar. Annar er, at málið verður tikið upp á tingi, og hin er at umboðsmaðurin kannar málið. Eitt er so vist: almenningurin kann ikki góðtaka, at hetta mál verður tagt burtur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvussu nógv kostar mjólkin?

**Eyðun Mohr Viderø**



Fyri eina av fáu ferðunum hoyrdu vit ein blaðmann í sjónvarpinum viðgera eitt mál, ið hevur almennum áhuga, men har hann ikki frammanundan avgjørdi, hvørja støðu vit øll onnur skuldu hava um spurningin!

Spurningurin hjá Øssi Winthereig var, um tað er í lagi ella ikki, at ein mjólkarpakki kostar so nógv sum 10 kr. Hví kostar hann so nógv?!

Upprunin til orðaskiftið var, at ein "nýggjur" løgtingsmaður - Kaj Leo Johannesen - hevði kannað og funnið fram til ta "genialu" sannføring, at um vit keyptu samlaðu mjólkanýtsluna í Føroyum úr Scotlandi, so vóru einar 20 mió. kr. at spara hjá "barnafamiljunum"!

Bóndin Rólvur Djurhuus vísti á, at tá Løgtingið við samtyktini av fíggjarløgtingslógini fyri 2003 hevur lækkað studningin til jarðarbrúkið - bøndurnar -, so mátti mjólkarprísurin hækka tilsvarandi fyri at fáa javnvág í dagliga húsarhald teirra!

Hann vísti millum annað á, at tað ikki var so einfalt at umseta prísin í Skotlandi til føroysk viðurskifti, tí talan mátti vera um prísin aftan á fluttningsútreiðslur, tollavgjøld v. m., men tað hevði Kaj Leo onga viðmerking til!

Spurningurin var síðan, um so almennur studningur skuldi tryggja "rímuligan" mjólkaprís, ella hvussu?

Her talaði Kaj Leo um neyðugar rationaliseringar innan jarðarbrúkið, men hvat har skuldi til, tað kom hann als ikki inn á. Annaðhvørt vildi hann ikki, ella tordi hann ikki, ella visti hann ikki, hvat skal til, ella hevur hann, sum tað mest sannførandi, helst í høvuðsheitinum ikki ánilsi um, hvussu almennu bóndabrúkini verða umsitin í gerandisdegnum!?

Kaj Leo helt fyri, at mjólkin var nú so kostnaðarmikil, at foreldur heldur keyptu sodavatn í staðin fyri mjólk!!!

Kaj Leo ivaðist ikki í, at nú talan var um avskriving - sanering- av skuld hjá bóndunum, so skuldu barnafamiljurnar gjalda gildið!!??

Um her er talan um vantandi vitan, ella talan var um " provokatión", var so nakað høpi í?

Sambært niðurstøðuni hjá bóndanum Rólvi Djurhuus um javnvág í rakstri, so kann spyrjast, um gjørdu íløgurnar eru útroknaðar og játtaðar av Jarðarráðnum í mun til, hvat ein bóndagarður av kendu støðd kann bera!! Neyvan!! Og hví er so neyðugt við avskrivingum eftirgevingum?

Men spurningurin er so:"Hví skal mjólkin ikki hækka í prísi eins og alt annað í sambandi við lønarhækkingar í landinum?"

Hví skulu foreldur - barnafamiljur - í hesum einasta føri spara, tí mjólkin er hækkað við kr. 0,50 fyri liturin? Hvat er meðni orsøkin til, at vit í góðum árum kenna trongd til at seta okkum í búgv, fáa konu og børn, og fáa okkum hóskandi starv fyri at evna og føða okkum sjálvi og okkara familju??

Í mun til samlaðu hækking í inntøkuni í landinum, so krevja og ynskja vit hægri løn, hvør í sínum lagi, og í tí samanhangi verður eingin afturúr sigldur í mun til, hvussu støðan var frammanundan.

Men hvør varnast, um rúsdrekka, sigarettir ella oljuprísir hækka ? Tí: drekkast má-roykjast má og koyrast má!

Gott er at hava øvundsmannin. Gud náði hann, ið harmaður verður!

Fyri árum síðan var tað ein frammíhjárættur at vera borin til ein bóndagarð. Hetta var ikki nakað, har ein kundi taka seg til rættis. Men samstundis sum bóndin sat tryggur á høvuðsmatframleiðsluni, og harvið hevði stórt vald - hevði arbeiðsplássini, hevði ráð til útróðrarbátin, hevði ráð til at keypa sær vitan og mentan við bókakeypi og ljóðføri, so var hansara tilvera í mun til meðmenniskjuni samstundis treytað av hansara menniskjaliga verumáta og hugsunnarhátti!

**Mangur hóttaði sær væl, annar illa!**

Í dag er henda mynd grundleggjandi broytt. Men tað er stórur munur á dugnaskapi hjá bóndum, hóast møguleikarnir eru nærum eins. Tað síggja vit á framleiðslu, røkiskapi og á skattalistanum!

Sum omanfyri nevnt, so má haldast, at ongin øvundar bóndanum, men um hann í skrift og í gerandisdegnum, sum vit av og til eru vitni til, vil verða harmaður, so má eg siga sum í seinna parti av omanfyri nevnda orðataki: Guð náði hann!

Til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum:

# Gev Norðoyggjum eitt umboð í nevndina fyri Norðoyatunnilin

**John William Joensen**
*Formaður í Norðoya Sambandsfelag*

Vit kunnu bert staðfesta, at tað hevur verið sera óheppið fyri vinnuna í Vágum og vágafólk sum heild, at tey ikki hava havt umboð í nevndini fyri Vágatunnilin.

Sama er galdandi í málinum fyri Norðoyatunnilin.

Eitt umboð fyri Norðoyggjar hevði umboðaáhugamálini hjá okkum, sum koma at brúka tunnilin, og hugsa vit tá serliga um áseting av gjaldi og samskiftið við vinnulívið í Norðoyggjum.

Tað er ikki rætt at norðingar verða hildnir í óvissu, um gongdin í málinum og hettar kemur samtundis illa við hjá vinnufyritøkum í Norðoyggjum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Barnaansing og almenn forsorg

**Heðin Zachariasen**
*løgtingsmaður og borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu*



Tá tingmál nr 79/2002 um broytingar í forsorgarlógini var til viðgerðar í tinginum, var eg framsøgumaður fyri Fólkaflokkin í hesum málið. Áðrenn eg fekk orðið, gjørdu Gerhard Lognberg fyri Javnaðarflokkin, sum eisini er borgarstjóri í Skopunar Kommunu og Alfred Olsen fyri Sambandsflokkin, sum hevur verið skrivari í Nes Kommunu í mong ár, viðmerkingar til tølini, sum vóru uppgivin í skjali, sum fylgdi við málinum. Teir, eins og eg sjálvur, vildu vera við, at teirra kommuna hevur nøktandi barnaansingarpláss. Men í skjalinum var upplýst, at Almannastovan hevði útgoldið 193.785,00 kr. vegna vantandi barnaansing í Skopunar kommunu, fyri Nes, Toftir og Saltnes var útgoldið 83.752,00 kr og fyri Hvalvíkar kommunu 25.903,00 kr. Fyri allar kommunur í Føroyum eru útgoldnar omanfyri 7 mió kr í 2002 vegna vantandi barnaansing.

Sum borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu undraðist eg yvir, at Hvalvíkar kommuna var við í yvirlitinum yvir forsorg útgoldna í samband við tørvandi barnaansing í kommununi. Tí tað samsvarar ikki við, at Hvalvíkar Bygdaráð fyri fleiri árum síðan gjørdi av, at tað ikki skuldi verða manglandi barnaansingarpláss í kommununi. Og sum borgarstjóri hevði eg ikki undirskrivað nakað skjal, sum gav grønt ljós til nakað útgjald í okkara kommunu. Tí valdi eg í samband við 1. viðgerð av tingmálinum, at spyrja landsstýrismannin um hesi tøl veruliga vóru røtt. Eftirfylgjandi havi eg eisini kannað hetta nærri hjá okkum sjálvum og eri komin fram til, sum eisini upplýst í samrøðu við Útvarp Føroya, at í eitt stutt tíðarskeið í 2002 hava vit ikki kunna nøktað nevnda økið, tí vit mangladu dagrøktarar. Leiðarin fyri dagrøktina hevur váttað, at so er.

Hetta er fult í trá við galdandi lóg, og tað er sjálvsagt heldur ikki neyðugt, at borgarstjórin avgreiðir tílík mál, tí tað er jú dagrøktarleiðarin, sum hevur dagligu ábyrgdina av hesum økinum. Bygdaráðið samtykkir fíggjarætlanina fyri dagrøktina fyri eitt ár í senn, sum leiðarin so umsitir. Og sambært hesum ávirkar ein tílík váttan hvørki fíggjarætlanina fyri dagrøktina ella fíggjarætlanina hjá kommununi. Hetta er ein váttan útskrivað eftir umbøn og er send Almannastovuni, sum umsitir og hevur ábyrgdina av almennu forsorgini. So her er rætt farið fram.

Eg vil gjarna undirstrikað, at eg í tinginum ikki legði nakran undir nakað óregluligt, men spurdi um upplýstu tølini vóru røtt, út frá tí, sum eg havi greitt frá her. At hetta saman við viðmerkingunum frá Gerhardi Lognberg og Alfred Olsen er blivið til eitt mál, er ein onnur søga.

Eitt, sum ikki er komið greitt fram í viðgerðini er spurningurin, hvussi leingi ein váttan fyri vantandi barnaansing, er galdandi. Tí, sum eg dugi at síggja, so váttar dagrøktarleiðarin, at einki pláss er tøkt í løtuni, men at væntast kann at pláss verða tøk, tá ið barnagarðurin letur upp. Men eg síggi einki skriv ella áheitan, har Almannastovan fylgir málinum upp. Í samband við broytingarnar í forsorgarlógini sigur Almannastovan í hoyringarsvarinum, at broytingarnar helst fara at føra við sær, at kommunurnar verða meira nærlagdar at upplýsa Almannastovuni, tá ið viðskiftafólk fáa tilboð um barnaansing. Hvørjar treytir setir Almannastovan kommununum í samband við eina tílíka váttan. Er tað kommunan ella Almannastovan, sum skal fylgja málinum upp? Møguliga eru fastar mannagongdir hjá Almannastovuni í hesum málið, sum Almannastovan ella landsstýrismaðurin kann greiða frá.

Eftir galdandi lóg er tað Almannastovan og ikki kommunurnar, sum umsitur og hevur ábyrgdina av almennaøkinum og tí ansar eftir, at forsorg ikki verður útgoldin, tá ið barnaansing er útvegað. Í brævi dagfest 7. mars 2003, heitir Almannastovan á kommunurnar um at boða teimum frá, tá ið barnaansing er útvegað. Sjálvt um kommunurnar skulu koma við neyðugu upplýsingunum, so kann Almannastovan ikki við hesum skrivi leggja ábyrgdina á hesum økinum frá sær yvir á kommunurnar. Almannaøkið er framvegis undir landinum.

Hetta málið er eitt talandi dømi um, at tað er betri, tá ið umsitingin verður nærri borgaranum. Men sum eg førdi fram undir viðgerðini, at tá fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing verður løgt út til kommununar at gjalda, so er neyðugt at báðir endar eru við - ábyrd og skyldur. Og tí er ongantíð ov skjótt, at hetta økið verður lagt út til kommurnar at umsita, so at avgerð og ábyrgd fylgjast, so at hann sum játtar, eisini er hann, sum skal gjalda.

# Samgongan sparir seg eftir reyv við at skerja flutningsstuðulin til vinnuna í útjaðaranum

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Samgongan jarðleggur fiskivinnuna í útjaðaranum við at taka flutningsstuðulin frá henni uttan at finna arða alternativa loysn á trupulleikanum við kostnaðinum av flutninginum frá meginøkinum til framleiðslu, har sund og firðir skilja.

Undirritaði hevur fyrr gjørt vart við, hvussu trupult tað er hjá virkjum í útjaðaranum at kappast um rávøruna, tá kappingartreyutirar ikki eru eins.

Kostnaðurin frá Uppboðssølu til virkingastað, har sund og firðir skilja, er eitt nogv dýrkandi lið , serliga tá ein hevur í huga, at marginalarnir eru smáir.

Ein stabil politisk skipan er neyðug og ikki ein skipan har tú broytir tingini frá degi til dags uttan himpr og uttan at hugsa um konsekvensirnar av tínum gerningum.

Er tað kanska betri at fólk sum kundu havt eitt arbeiða á fiskavirki heldur fara aftur til ALS,- tað kann nevniliga skjótt gerast veruleikin.

Sama ger seg galdandi við russaraframleiðsluni hjá Fiskavirking sum er ein sokallað "nicheframleiðsla", - hví oyðileggja hetta atlernativ av berari óvitinheit.

Hava tit í Fiskimálastýrinum, nakrantíð verið úti á føroyskum virkjum og sæð og hoyrt meiningarnar hjá leiðslunum har ella havt tær til hoyringar, áðrenn tit takað avgerðir sum hesa ?? Eg trúgvi neyvan teir nakrantíð hava sæð tykkum í nánd av virkjum sínum.

Stuðul er ikki altíð av tí ringa, tað veldst um hvar og hvat tú stuðlar og í hesum sambandi er stuðulin ein bøtandi hond fyri vinnuna í útjaðaranum sum javntstillar kostnaðin hjá henni ,at flyta fisk frá uppboðssølu til virkini har sund og firðir skilja og flutningskostnaðurin tískil er nógv hægri ,enn í meginøkinum.

Hugsið tykkum væl um áðrenn tit gera skerjingina, tí hon kann skjótt koma tykkum aftur um brekku í við øktum arbeiðsloysi.

# Vón fyri framman?

**Frá tí Føroyska ST felagnum**

Nú ymiskt hevur verið frammi í fjølmiðlunum og á manna munni um støðuna í Irak, so hevur nógv kjak eisini verið um hvønn leiklut, ella kanska heldur væntandi leiklutin Sameindu Tjóðir hevur havt og fer at hava í hesum máli. Onkur hevur hildið fyri, at ST hevur spælt fallit og at tað ongar "tenn" hevur. Onnur halda at leikluturin hjá ST nú er vorðin ein hjáleiklutur og at felagsskapurin framyvir fer at virka meira ella minni sum ein gøtusópari, ið ruddar upp í gøtunum eftir tíðarinnar stormum og sum hereftir má lata sær lynda at sópa gólvini í gongdunum hjá teimum máttmiklu. Uppaftur onnur siga, at ST hoyrir fortíðini til og at tað als ongan leiklut eigur í framtíðini.

Ígjøgnum skotríðuna av analysum, ákærum og meiningum, ið floyma yvir okkum í hesum døgum, ber kortini til at staðfesta eitt: Ein stórur partur av fólkunum kring heimin vóru vónbrotin av, at ein loysn á Irak-kreppuni ikki fekst gjøgnum ST. Hetta sást týðiliga í heimspressuni og á úrslitunum av meiningakanningunum beint áðrenn og aftaná at kríggið í Irak brast á fyri góðari viku síðani. Fólk allastaðni runt um í heiminum vendu sær til tann einasta altjóða stovnin, ið tey mettu at hava løggilda heimild at loysa eitt mál sum Irakmálið. Hetta er kanska fyrstu ferð at hetta er staðfest so sannførandi og er komið so týðiliga fram. Hetta er ikki smávegis staðfesting. Tí júst hetta ber kanska boð um, at tað finnst ein møguleiki hjá okkum at fáa vend í altjóða samskiftið á einum støði, sum tað áður bert hevur verið droymt um.

Út frá hesi staðfesting ber kanska til at hóma tvey ting: Sama hvat politiska leiðslan heldur, so eru grasrøturnar um meginpartin av heiminum fyri at ST er tað rætta forumið at loysa altjóða mál í; og fyri at ST er einasti fólkaræðisliga løggildi altjóða stovnur, ið er evsti myndugleiki í heiminum, tá ið tað snýr seg um altjóða mál.

Kanska eru lunnar lagdir undir eina tilgongd, ið sum frálíður kann fara at hava við sær at framtíðar leiklutin hjá ST, beint ímóti svartskygdu forsøgnunum, verður styrktur aftaná hetta dapra tíðarskeiðið við niðurbróting og ruðuleika. Tað er kanska hetta sum ST-aðalskrivarin Kofi Annan m.a. sipar til í yvirlýsingini, ið varð kunngjørd, tá ið kríggið brast á í farnu viku:

ST-Aðalskrivarin Kofi Annan:
Yvirlýsing um álopið á Irak
New York, 20. mars 2003

Í dag er kríggj brostið á í Irak fyri triðju ferð innan eina fjórðingsøld. Hetta hendir hóast altjóða samfelagið og Sameindu Tjóðir hava gjørt sítt ítasta til tess at fyribyrgja tí.

Um vit høvdu hildið á eitt sindur enn, hevði tað møguliga eydnast at fingið avvápnað Irak á friðaligan hátt, ella - um ikki - so kundi heimurin tikið stig til at loyst hetta vandamál við felags avgerð og útint tiltøkini við størri heimild og breiðari stuðli enn tað sum er veruleikin í dag.

Men latið okkum ikki dvølja við fortíðar tvídráttir og spjaðing. Latið okkum møta veruleikanum sum hann sær út í dag, sama hvussu beiskur hann sýnist, og leita eftir gongdum leiðum at skapa størri eind framyvir.

Mínir tankar og samkensla eru í dag við fólkinum í Irak, sum enn eina ferð standa fyri roynslum. Eg vóni at at allir partar samvitskufult fara at fylgja ásetingunum í altjóða mannarættarligari lóg og fara at gera alt sum stendur í teirra valdi til tess at verja vanligu borgararnar í Irak móti grimu avleiðingunum av kríggi. Sameindu Tjóðir fara í sínum lagi at veita teimum alla ta hjálp og tann stuðul, sum felagskapurin er førur fyri. Latið okkum vóna at framtíðin verður nógv bjartari hjá irakiska fólkinum enn hesi seinastu mongu árini hava verið og at tey skjótt fáa høvi at endurreisa landið í friði og frælsi undir lógligum viðurskiftum.

Hesar seinastu vikurnar hava heimsins fólk sýnt hvussu stóran dent tey leggja á at heimildir eru lagdar í hendurnar á Sameindu Tjóðum. Tey hava gjørt greitt, at tá ið óvissa og vandi hótta, ynskja tey at síggja valdið hildið í teymum av heimild. Tey vilja hava sína leiðslu at koma saman í Sameindu Tjóðum og har loysa teir trupulleikar sum mannaættin øll er felags um.

Eg vil av øllum alvi virka fyri at Sameindu Tjóðir møta hesari avbjóðing á nøktandi hátt.